


**Kunningarstovurnar kring landið**

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | Tel. | 302425 | Klaksvík | Tel. | 456939 | Tvøroyri | Tel. | 372480 | Skopun | Tel | 361704 |
| Fuglafjørður | Tel. | 444860 | Vágar | Tel. | 333455 | Vágur | Tel. | 374342 | Vestmanna | Tel | 471500 |
| Runavík | Tel. | 417060 | Sandoy | Tel. | 361836 | Nólsoy | Tel | 327060 | | | |

STARVSLÝSING

## Kommunuskrivari til Leirvíkar Kommunu

Leirvíkar kommuna søkir eftir kommunuskrivara at byrja 1. september 2007 ella skjótast tilber. Kommunuskrivarin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu umsitingini og øllum viðurskiftum í kommununi annars.

1. januar 2009 leggja Gøtu kommuna og Leirvíkar kommuna saman í Eysturkommunu og verður kommunusamanleggingin ein partur av arbeiðinum hjá nýggja skrivaranum. Eysturkommuna verður 4. størsta kommuna í landinum og fyri rætta persónin verður tað ein avbjóðandi og spennandi uppgáva.

Søkt verður eftir einum persóni við góðum fakligum førleika og royndum. Kunnleiki til almenna fyrisiting og leiðslu hevur stóran týdning eins og góð samstarvsevni. Kommunuskrivarin hevur beinleiðis tilvísing til borgarstjóran.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fríðgerð Heinesen, borgarstjóra, tlf. 743006.

Umsókn við avritum av prógvum og ummælum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 13. august 2007.

Leirvíkar Kommuna
Postboks 42
520 Leirvík

www.leirvik.fo

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42, 520 Leirvík

STARVSLÝSING

## Maskinlærlingur [endurlýsing]

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi maskinlærlingi til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja eftir summarfrítíðina.

Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá stovninum. Neyðugt er at hava vanligt koyrikort.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært lærlingasáttmálanum millum Føroya Handverkarafelag & Landsfelag Handverkanna og Føroya Arbeiðsgevarafelag & Føroya Handverksmeistarafelag. Lærutíðin er 4 ár og endar við eini sveinaroynd.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. august, 2007. Merk umsóknina „Umsókn maskinlærlingur“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tlf. 540 950 ella Johan Hansen, smiðjumeistara, á tlf. 540 951.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*



## Starv í Kaupthing Bank

Í sambandi við at virksemi okkara er munandi vaksið seinastu tíðina, sóknast vit eftir fólki til umsitingardeild okkara.

Við tilvísing til leiðaran á umsitingardeildini kemur tú at fáast við handfaran av skjalagongd í sambandi við virðisbrævahandlar, uttanlandssamskifti, alt vanligt bankavirksemi annars og aðrar fyrifallandi uppgávur.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og hevur eitt positivt lyndi. Vit leggja stóran dent á, at okkara starvsfólk eru útvend og løtt at samstarva við.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv í einum livandi felagi, sum støðugt mennist.

Millum starvsfólkini valdar ein góður samstarvsandi í einum spennandi og mennandi umhvørvi.

Hevur tú okkurt at spyrja um í samband við starvið í Kaupthing Bank, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Regin I. Jakobsen, umsitingarstjóra, á telefon 351510 / 551510 ella telduposti regin@kaupthing.fo.
Til ber eisini at søkja starvið umvegis heimasíðuna.
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. juli 2007.

Kaupthing Bank
Bókbindaragøta 8
Postboks 3090
FO-110 Tórshavn
www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK